Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Inntøkur av einskiljingum av almennum ognum og Búskapargrunnur Føroya

Spurningar:

1. Nær skulu inntøkur av einskiljing av almennum ognum í Búskapargrunnin, sambært lóg um Búskapargrunn Føroya?
2. Hvat er at rokna sum inntøka av einskiljing av almennum ognum eftir § 2, stk. 2, nr. 2 í lóg um Búskapargrunn Føroya?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at inntøkan av eini møguligari sølu av almenna ognarlutinum í P/F Smyril Line og P/F Tjaldur eigur at fara í Búskapargrunnin?

Viðmerkingar:
Til at fíggja keyp av fraktferju og til at rinda veðhaldið fyri P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur samgongan ætlanir um at selja partabrøvini í partafeløgunum Smyril Line og Tjaldur. Landsstýrið hevur gjørt eina virðismeting av ognarluti landsins í Smyril Line, og er hon áljóðandi 79 mió. kr. Ongin virðismeting er gjørd av partabrøvunum í partafelagnum Tjaldur, men upphæddin á fíggjarlógini fyri 2022 er tann sama, sum var ásett á fíggjarlógini fyri í fjør. Sostatt metir mann at fáa tilsamans 86 mió. kr. fyri søluna.

Sambært lóg um Búskapargrunn Føroya skulu inntøkur av einskiljingum av landsins ognum setast í Búskapargrunnin. Ítøkiliga merkir hetta óvanligar eingangsinntøkur, so sum søla av partabrøvum og søla annars av almennum ognarlutum. Eitt nú varð eitt serligt vinningsbýti latið eigarunum av P/F BankNordik í 2017, tá ið bankin hevði selt Vørð í Íslandi og hevði tikið vinnukundavirksemið í Danmark av. Fíggingargrunnurin lutaði upphæddina víðari til landið, sum koyrdi tað í Búskapargrunnin.

Samgongan ætlar at fíggja keyp av fraktferju og avloysaraskipi, umframt veðhald fyri P/F Eystur- og Sandoyartunlar, við at selja almenna ognarlutin í P/F Tjaldur og P/F Smyril Line. Spurnartekin kann tískil setast við, um heimild er til at brúka eingangsinntøkuna av søluni til at fíggja hesi átøkini, ella um ikki hesar inntøkur av røttum eiga at fara í Búskapargrunnin sambært lógini.

Á Løgtingi, 31. mars 2022

Bjarni Kárason Petersen